# lum fryntligar íslendingar



*Serliga á lágættunum er leguplássið við Ástjørn framúr*

við, her vit standa. Vit koyra eitt sindur fram eftir vegnum, og tá kennist tað sera hugaligt at síggja føroyska Merkið daga uppi yvir trækrúnunum.

Vit snara inn millum trøini og koma í túnið. Tjørnin og umhvørvið líkjast sær sjálvum, sum tað var fyri tredivu árum síðani og meiri enn tað. Men her er nógv nýtt bygd.

Í túninum stendur annar av fyristøðumonnunum og prátar við rættuliga tilkomnan mann og við ein nakað yngri. Hesin seinni er gamal ástringur, og nú eru hesir so at siga stoknir inn á gólvið fyri at fríska gomul minni og fyri at vita, hvussu tað veit við. Hetta kemur ofta fyri.

Vit hyggja okkum um. Tjørnin er, sum hon varð, men tað er bøtt um dráttin. Millum bátarnar, ið flóta við litlu brúnna og liggja fyri íla, eru eisini føroyskir bátar. Trævøksturin er vorðin størri, og lítla plenan, har tað plagdu at vera fótbóltsdystir móti dreingjum, ið komu úr smábygdum í grannalagnum og høvdu stóra heimafylgi, líkist sær sjálvari

Nú heilsa vit fyristøðumonnunum báðum. Teir vísa okkum leguplássið, og tað er týðuligt, at teir kenna hetta sum ábyrgd og avbjóðing, og at teir hava eldhuga fyri verkinum. Vit fáa søguna um, nær føroyingar hava verið og bygt hetta og hitt húsið, og tað er ikki sørt, at tað kennist hugaligt, tá ið teir undirstrika, at teir illa duga at ímynda sær, hvussu tað hevði staðið til við summarlegunum við Ástjörn, um føroyingarnir ikki so dyggiliga høvdu tikið undir við arbeiðnum – bæði í at byggja og í at vera og hjálpa til á legunum.

Millum starvsfólkini eru tvær systrar fyristøðumenninar. Onnur teirra, Helga Gerðalíð, er gift í Klaksvík, og hin, Hanna, er gift Pola Purkhús, sum er ættaður úr Kunoy. Tey búgva í Reykjavík, har Poli er ein av ábyrgdarmonnunum í Skemmunum hjá Jákupi á Dul Jacobsen. Umframt tær báðar eru tvær aðrar systrar giftar føroyingum. So lønin frá íslendingum fyri arbeiðið, sum føroyingar hava gjørt við Ástjörn, hevur verið rættuliga góð!

Tað er altíð hugaligt at rógva aftur á aftur tað, sum er gamalt og gott. Millum starvsfólkini er ein, sum eisini var har fyri tredivu árum síðani. Hon er næsta skyldkona fyristøðumenninar báðar og sjálvandi systrar teirra. Hon kemst við navnið á konuni, og eftir at tær hava heilsast og minst aftur á, hvør var her í 1972, og hvussu umstøðurnar vóru tá og veðrið – eins og í Føroyum verður tað á hesum leiðum eisini prátað um tað – gongur prátið aftur og fram. Svanhvid greiðir frá, at hon sum ung plagdi at arbeiða á Seyðisfjørðinum í sildavertstíðini. Tá var nógv ferðsla og nógv virksemi á Seyðisfirði. Íslendingar fiska framvegis nógva sild, men nú er lítið lív á Seyðisfjørðinum.

Vit njóta blíðsskap, heilsa upp á krakkarnar, sum børnini ofta verða nevnd, og tá ið vit hava skrivað í gestabókina, biðja vit farvæl og fara longri fram á leiðini. Enn eitt gott upplivilsi er komið í viðførið.

Tey við tjørnina vóna, at lágættin fer at halda fram. Ættirnar hava ógvuliga nógv at siga fyri summarveðrið her á leið. Um høgættin sleppur framat verður tað ongantíð rættuligt summarveður. Á lágættunum verður tað so heitt og gott, sum tað sjáldan ella ongantíð er í Føroyum.

## Húsavík

Kósin verður sett tvørtur um Kelduhverfi og út á Tjörnes. Kelduhverfið er eitt av mongu økjunum í Íslandi, sum jarðfrøðingar ofta sipa til. Her er tilfarið sandur, sum er runnin undan jøklunum longri inni í landinum. Tað ber framvegis til at síggja rivur og sprungur, sum stóðust av vulkanska virkseminum í Krafla við Mývatn miðskeiðis í sjeyti árunum.

Tað er langt millum búsetingarnar, og tær fækkast her á leið. Á Flatey, sum liggur her í flógvanum, búðu tað inntil fyri hálvt hundrað árum síðani hundrað fólk. Hetta búplássið fekk somu lagnu sum Slættanes fekk í sekti árunum, og sum hóttir fleiri aðrar av smábygdunum heima hjá okkum sjálvum. Gongdin er tann sama í Íslandi og Føroyum. Smáplássini avtoftast, og tað parturin av fólkinum, sum býr á stórplássunum økist.

Onkrar kanningar hava víst, at tað er ikki tí, at lønirnar eru so nógv hægri í stórplássunum, har útreiðslurnar altíð eru væl størri. Miðallønin í fleiri smáplássum, har tað hevur verið nógv fiskarí út frá, hava ofta verið høgar í Íslandi. Men tað eru ikki bara lønirnar, sum hava týdning. Hugurin hjá unga fólkinum stendur til stórplássini, har tilboðini á eitt nú mentanarøkinum eru fleiri. At umstøðurnar, ábyrgdirnar og útreiðslurnar ofta vísa seg at bera við sær, at nýtslan av tilboðunum ikki er nakað serlig hevur einki at siga. Býarvirðini tykjast vinna alt meiri fram, og tey verða alt færri, sum seta bygdarvirðini høgt.

Íslendska fiskivinnan er nógv broytt tey seinastu árini. Gongdin hevur verið, at tey, sum eiga skip og kvotur, eru færri nú, enn tey vóru fyri einum ættarliðið síðani. Tá ið vit koma til Húsavíkar kenna vit okkum næstan sum at vera í føroyskari bygd, ið kanska er eitt sindur størri enn Fuglafjørður. Har er flakavirki, og har liggja tvey línuskip at bryggju. Fiskur og fiskaarbeiði eigur nógv rúm í hesum samfelagnum, sum kennist liggja eitt sindur fyri seg sjálvt.

Ferðafólkavinnan tykist eisini eiga sín lut. Nakrir av útlendingunum, sum vóru at síggja á Mývatnar leiðini, eru aftur at síggja her. Teir hava allir somu ørindi. Ferðavinnan lýsir við, at skip sigla út frá Húsavík við ferðafólkum, sum ætla sær at síggja hval. Sagt verður, at í níggju av tíggju førum eydnast tað at síggja hval! Og fransmenninir, sum vit heilsa upp á, ivast onga løtu í, at tað fer at eydnast teimum at síggja hval, tá ið tey um eina løtu skulu á ferð so norðarlaga, sum tey ongantíð hava verið áður. Norðari polarkringurin er bara nakrar fáar kilometrar burtur.

Á hesum leiðum eru nakrir spjaddir bóndagarðar at síggja. Birna, kona Hera prest, systkinabarnið, er ættað av Tjörnesi. Her vaks hon upp á bóndagarðinum Ytra Tunga. Tað er hugtakandi at hoyra hana siga frá umstøðunum, sum hon vaks upp undir. Tær eru ógvuliga líkar umstøðunum, sum tær vóru á bygd í Føroyum.

Birna var tíggju ára gomul, tá ið hon fór í skúla. Skúlagongdin var í stovuni heima hjá Birnu og teimum. Har savnaðust 10-15 børn av gørðunum í grannalagnum. Her var heldur ikki ókent við ferðalærarum. Fyri Birnu er tað ikki ókent at ganga í skúla í tvær vikur og so at halda frí í tvær vikur, meðan lærarin arbeiðir á øðrum plássi. Seinni var hon á kostskúla, áðrenn hon fór til Húsavíkar og Akureyrar at arbeiða og seinni til Reykjavíkar at lesa búskap á lærda háskúlanum.

Tá var tað, at hon hitti svínoyingin, sum nú er prestur í Suðurstreymoyar vestara prestagjaldi. Heri las gudfrøði, sálarfrøði, søgu og fólkalívsfrøði og pedagogikk á lærda háskúlanum í Reykjavík. Hann er borin til festið har Heimi í Svínoy, og tí hevur tað ivaleyst fallið honum raðið og nátúrligt, tá ið hann so ofta hevur vitjað í Ytru Tungu.

Tá ið eg spyrju Birnu, hvar børnini í gamla grannalagnum hjá henni nú ganga í skúla, ljóðar søgan, sum hon er kend á so mongum øðrum smáplássum – bæði í Íslandi og í Føroyum. Har eru so at siga eingi børn. Tey, sum eru, ganga í skúla í Húsavík. Eingin býr á garðinum Ytru Tungu. Kríatúrini eru burtur. Birna og systkini eiga jørðina og barnaheimið, sum tey nýta sum frítíðarbústað.

Leiðin til Akureyrar er fittur teinur at koyra. Her er lítið fólk at síggja og lítil ferðsla. Teinurin úr Húsavík og til Akureyrar kennist ov langur at ferðast aftur og fram til arbeiðis ella lesna hvønn dag. Tosað verður tó um at betra um farleiðina soleiðis, at møguleikin fyri pendling skal gerast betri. Hetta verður hildið at fara at gagna bæði Húsavíkar økinum og eitt nú lærda háskúlanum á Akureyri.

Fyrsti partur av higartil trimum ferðahugleiðingum hjá Jóannesi Hansen var í Sosialinum fríggjadagin 24. februar, annar partur var í blaðnum fríggjadagin 17. mars, og triði partur fríggjadagin 24. mars. 5. og síðsti partur verður eftir ætlan í blaðnum fríggjadagin 21. apríl.



*Húsavík er til støddar sum stór føroysk bygd*



*At síggja havnina í Húsavík er sum at síggja føroyskt havnarlag*